


**Nr. 21** *11. oktober 2026* **86. árg.**

# Hann gevur lívinum innihald og meining

Toril Sogstad úr Gjøvik var gestur hjá Astri Weber Gellain Laurendz á Visjon Norge. Toril bleiv frelst sum 14 ára gomul. Hon vaks ikki upp í einum trúgvandi heimi, og mamman legði henni tey ráðini, at hon skuldi ikki tosa um trúnna hjá sær, tað skuldi hon halda fyri seg sjálva, tí tað var privat.

„Men eg lurtaði ikki eftir henni," sigur Toril, „tí mítt hjarta brendi fyri Jesusi. Eg vitnaði og bað fyri sjúkum. Eg bleiv frelst í skúlanum gjøgnum tað kristna „skolelaget", sum vit kalla tað her í Noregi. Eg broyttist og bleiv trygg og glað, tá ið eg tók ímóti Jesusi. Vit høvdu andakt á skúlanum í fyrsta fríkorterinum. Teir trúgvandi næmingarnir skiftust um at hava hana. Eg var púra blonk viðvíkjandi kristindóminum, eg visti einki. Eg hoyrdi, at tey tosaðu øll um náði. Eg hugsaði: „Hvat er náði fyri nakað?"

Ein dagin, tá ið eg fór oman í miðbýin ørindi í oysregni, møtti eg formanninum í skolelaget, og eg segði: „Vilt tú siga mær, hvat ið náði er?" Hann leyp av súkkluni og segði: „Hygg, nú gevi eg tær eina gávu." So rætti hann tvær tómar hendur fram og segði: „Tú skalt ímynda tær, at eg rætti tær eina gávu. Vilt tú ikki taka ímóti henni?"

„Jú." Eg gjørdi, sum eg tók ímóti „gávuni". Men hann segði: „Tú mást pakka hana upp fyri at vita, hvat ið er í pakkanum." – Eg gjørdi, sum eg pakkaði hana upp. „Soleiðis skalt tú gera, tá ið tú tekur ímóti Jesusi. Gávan er ókeypis. Tú fært hana fyri einki. Men tú mást pakka hana út fyri at fáa fult gagn av henni," segði hann.

„Hvussu ber tað til, at tú ert so brennandi allastaðni, har tú fert, í fongsul, millum tey fátæku og rúsevnismisnýtarar í Moldava, Ísrael og aðrar staðir?" – „Tað eri ikki eg, men Heilagi Andin í mær, sum virkar. Tá kann eg ikki annað. Jesus hevur lagt hesa trongdina niður í meg. Tú verður ikki frelstur av at gera góðar gerðir. Frelsan er ókeypis, tú fært hana fyri einki. Men tú gert góðar gerðir, eftir at tú ert frelstur. Jesus hevur alt at týða fyri meg. Hann gevur lívinum innihald og meining.

*Effie Campbell.*

# Send av Gudi til mostrina

**Astri á Visjon Norge tosaði víðari við Toril Sogstad: Tú Toril, Gud hevur fleiri ferðir sent teg til fólk, sum lógu á deyðastrái. Sig frá:**

„Mamma og mostir vóru bara tvey systkin. Tær blivu óvinir um ein arv og vórðu fíggindar. Tær mistu sambandið hvør við aðra, og tað gekk út yvir okkum øll. Vit vóru fýra systkin, og vit mistu sambandið við okkara systkinabørn, mostir og mann hennara, sum vit kallaðu onkul.

Um ta tíðina hevði eg trý smábørn, og tær svóvu í hvør sínum kamari, og hetta serliga kvøldið var klokkan 10.30. Eg gekk eftir gongini og skuldi fara at leggja meg. Tá brádliga fái eg ikki flutt beinini. Eg standi har sum ein stólpi. Men so hoyri eg eina rødd siga inn í oyrað á mær: „Ring til mostur tína." Eg hugsaði: „Altso, nú eri eg blivin í ørviti. Tað man vera tí, at eg eri so móð. Hon vil ikki tosa við meg. Hon hevur skeldað meg og sagt, at tað eru bara tápulig fólk, sum trúgva á Gud.

Mostir og tey vóru ógvuliga verðslig og hildu bara verðslig bløð, harafturat er tað ófólkaligt at ringja til fólk so seint. Eg kann ikki ringja. – „Ring," segði røddin við størri myndugleika. Eg ringdi, og maðurin tók telefonina. Hann segði: „Sum tað var gott, at tú ringdi, Toril. Mostir tín liggur á Ullevål sjúkrahúsi. Hon liggur at doyggja." Eg helt, at eg kundi taka tokið inn til Oslo tíðliga í morgin ári. Tað gjørdi eg og fekk mær ein hýruvogn til Ullevål. Eg hevði ongantíð verið har fyrr. Har vóru nógvir stórir bygningar, og eingi skelti sóust nakrastaðni. Eg var púra í villareiði. Men tá hoyrdi eg eina rødd siga inn í oyrað: „Byrja at ganga!" Eg visti, at tað var Harrin, tí eg plagdi ikki at hoyra røddir. Eg fór so til gongu. At enda kom eg til ein ovurstóran bygning í fýra hæddum.

„Hvat nú, Gud?“ spurdi eg. „Gakk!“ Eg fór so upp gjøgnum allar trappurnar. Har var ein long gong við hurðum upp á báðar síður. – „Hvat nú, Gud? Eg kann ikki banka upp á allar hurðarnar og spyrja, um Edrun Ingebrigtsen liggur her?“ – „Gakk bara.“ Eg fór so til gongu, og tá kom onkul út gjøgnum einar dyr. – „Sum tað var gott, at tú komst, Toril. Eg orki ikki meir, eg havi ~~vakt í tvey døgn. Eg má heim at sova~~.“

So fekk eg mostur fyri meg sjálva. Hon lá og svav, og hon var ikki í hesari verð, hon var um at fara inn í deyðan. Eg tosaði við hana um ymiskt, vit høvdu upplivað saman. So las eg nøkur skriftstøð upp fyri henni. Tá var klokkan blivin 8.15 á morgni. Tað var bara eg, sum tosaði. Eg segði so við hana: „Mostir, um tú hoyrir meg, og um tú vilt taka ímóti Jesusi, gev mær so eitt tekn. So biðja vit saman um fyrigeving fyri alt tað skeiva, vit hava gjørt. Síðani siga vit við Jesus, at vit taka ímóti honum.“ Tá fekk eg tað seinasta veika „ja“ frá henni. Friðurin fylti rúmið. Eg kendi Heilaga Andan so sterkt inni har.

Eg hugsaði: „Nú havi eg gjørt mítt arbeiði, so nú fari eg heim.“ Tá ið eg kom til hús, ringdi systkinabarn mítt og segði, at nú var mostir farin.

*Effie Campbell.*

# Send av Gudi til yngstu systur mína

***Toril greiðir víðari frá:***

„Vit vóru fýra systrar. Sigrun, yngsta systir mín, og maðurin vóru farin til Miðalhavinum á „krydstogt“. Men Sigrun bleiv deyðasjúk og lá næstan alla tíðina í koyggjuni. Ferðin vardi í einar 2–3 vikur. Tá ið tey komu aftur til Noregs, fór hon á sjúkrahúsið. Hon hevði tá livrasvikt, nýrasvikt, hjartasvikt, krabba við spjaðing, høgan fepur og soppabruna. Alt var galið. Maðurin, sum sjálvur var lækni, ringdi til okkara og segði, at Sigrun lá fyri deyðanum. Vit fingu so at vita, at bara maðurin og báðir synir teirra fingu loyvi at vitja hana.

Eg hugsaði, at hatta kann eg ikki finna meg í, tí Sigrun má blíva frelst, áðrenn hon doyr. Eg bað til Gud, at eg mátti sleppa oman á sjúkrahúsið í Tønsberg. Hon lá í respiratori. Eg segði við Gud, at nú mátti Hann ordna tað so, at eg fekk Sigruna fyri meg sjálva, uttan at nakar í familjuni var har.

Eg fór við toki og kom inn á sjúkrahúsið og fann stovuna, har hon lá. Eg bankaði upp á dyrnar og fór inn. Tvær konur sótu við hvør sín skíggja og ansaðu eftir strikumyndunum,

sum nú næstan vóru flatar. Tey høvdu tappað 9 litrar av vætu úr kroppinum, og kortini var hon so hovin í andlitinum, at eg kendi hana ikki aftur.

Hon lá í óviti, í koma. Eg fór at tosa við hana um barnaminni. Eg visti, at tað seinasta, sum fer, er hoyrnin. Av og á segði eg nøkur bíbliuvers fyri henni. Hon hevði einaferð verið saman við mær á einari páskastevnu. Tá tók hon ímóti Jesusi. Men tað gleið alt út, tí hon hevði ongar kristnar vinir. So bleiv hon gift. Hon fekk eitt fínt og gott heim og tveir synir. Eg tosaði í ein og ein hálvan tíma, uttan at hon rørdi seg. Tá sigi eg við hesar konurnar. Tað nyttar einki, nú fari eg bara.Tá siga tær: „Kanst tú ikki bara fara út á gongina at hvíla teg einar 5–10 minuttir og so koma inn aftur. Tað er so hugnaligt at hava teg her. So hvíldi eg meg eina løtu, so fór eg inn aftur og las bíbliuvers fyri henni og tosaði um barnaminni í ein og ein hálvan tíma. Nú vóru tríggir tímar farnir.

So sigi eg: „Sigrun, um tú hevur hoyrt meg, og um tú vilt biðja til Jesus saman við mær, so skal eg biðja hart, og so biður tú innantanna og gevur Jesusi lív títt, um tú vilt tað. Men eg vil, at tú skalt siga mær eitt ja til hetta, um tú megnar tað. Nú leggi eg mín arm upp at tínum armi uppi í songini og pirka so við tínum fingri upp á mína hond. Tá tók hon um skøvningin á mær og trýsti so fast, at eg næstan fekk ilt. Hon trýsti, meðan vit bóðu alla frelsubønina og eitt sindur afturat. So bóðu vit til Jesus og góvu honum alt lív okkara. Tað var stórt, og tað var sterkt.

Tá ið eg so skuldi fara út gjøgnum dyrnar, sparkar hon dýnuna av sær og vinkar til mín við vinstra fóti. Vit skulu hava Jesus við í glaðum stundum og geva honum æru og heiður, og í tungum stundum bjóðar Hann okkum at leggja allar byrðar yvir á seg. (1. Pæt– 3,5). „Ren og retfærdig, himmelen værdig,“ tað er tað, sum Jesus hevur gjørt fyri okkum, vit hava so nógv at siga Jesusi takk fyri.

*Effie Campbell.*

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 11. okt. | **Tekstur:** | 1. Mós. 25,24–34; 27,5–17 + 30–36 + 42–43 | **Bíbliuorð:** | 2. Mós 20,15 |
| 18. okt. | **Tekstur:** | 1. Mós. 28,10–22 | **Bíbliuorð:** | 5. Mós. 4,39 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74




Nr. 22 *25. oktober 2026* 86. árg.

# Hví tilbiðja ein Gud, sum eg ikki síggi?

*„Í hjarta dárar siga: „Ei nakar Gud er til.“ Sálm. 14,1.*

Fyri nøkrum árum síðani var tað ein maður, sum undirskrivaði seg „ateistur“. Hann spurdi úti á netinum: „Hví skal eg tilbiðja ein Gud sum eg ikki síggi?“

Men eg spyrji gudloysingin: „Hví goymir tú teg fyri einum koronavirusi, sum tú ikki sært?“

Veruleikin er, at alt tað, sum vit síggja henda í tí **sjónligu** verðini, er ein avleiðing av tilburðum í tí ósjónligu verðini.

Eg síggi ikki elektrisitet; men eg síggi avleiðingarnar av tí.

Eg síggi ikki vindin; men eg síggi avleiðingarnar av honum.

Eg síggi ikki virus; men eg síggi fylgjurnar av tí.

Eg síggi ikki Gud; men eg síggi skaparverk hansara, og lív mítt bleiv púra broytt, tá ið eg tók við trúnni á tann ósjónliga Jesus. Sjónliga lívið hjá allari mínari familju er úrslitið, sum stendst av náðini, virkinum, fyrigevingini, kærleikanum, inntrivinum og signingunum hjá tí ósjónliga Gudi.

Hví goyma ateistarnir seg fyri einum virus, sum teir ikki síggja?

Í tí **ósjónligu** verðini eru Satan og illu andarnir eisini. Eg vissi teg um, at teir eru ikki ateistar. Ják. 2,19 sigur, at illu andarnir trúgva á tann eina sanna Gud – og teir skelva av ótta fyri dómadegi. Teir vita, hvat ið bíðar teimum fyri framman.

Einaferð vóru teir uppi hjá Gudi – Gud skapti teir. Men Satan gjørdi uppreistur og vildi vera Gudi líkur. So bleiv hann blakaður út – og saman við honum uml. triðingurin av einglunum. (Opb. 12,3 og 7–9).

Sannleikin er tann, at Skriftin sigur, at vit menniskju hava einki at orsaka okkum við, tí tað sæst av verkunum: Róm 1,20 „Tí at hin ósjónliga vera hansara, bæði hansara ævigi máttur og guddómleiki, er sjónlig frá skapan heimsins, við tað at tað skilst av verkunum – so at menn einki skulu hava at orsaka seg við."

\- - - - -

Viðhvørt kanst tú renna teg í fólk, sum ikki beinleiðis siga, at tey eru ateistar. Tey siga „Eg kann ikki trúgva!" Hatta passar ikki, hatta er ósatt. Jesus sigur: „Hvør, sum VIL VIL VIL, hann taki lívsins vatn fyri einki" Opb. 22,17. Tað er ein viljasak, og tað er gratis. Í Jóh. 4. kap. sigur Jesus við konuna úr Samaria, at hon skuldi biðið hann um vatn, so hevði hann givið henni tað livandi vatnið (v. 10). Víðari sigur Jesus, at vatnið, sum hann gevur, skal verða ein kelda av vatni, sum vellir fram til ævigt lív (v. 14). Jesus leggur sjálvur trúnna inn í tað mannahjartað, sum kemur og biður Jesus um at fáa hitt livandi vatnið, og viðkomandi skal ongantíð tysta aftur. Hugsa nú um hatta!

\- - - - -

Ein ung kona í familjuni segði mær einaferð, at hon arbeiddi á einum arbeiðsplássi, har stjórin segði, at hann var ateistur. Hann gekk við rankum ryggi og kunngjørdi, at hann var „ateistur". Hann helt vist, at tað var ein flottur „tittul".

Ein morgun fór konan tíðliga frá húsum til gongu oman í býin. Veðrið var av tí allar fagrasta. Tá hon kom inn, var stjórin longu komin. Hann sat á einum stóli við vindeygað og hugdi út yvir Havnina. So segði hann: „Á dett pena veður. Ja, vit hava sanniliga nógv at vera takksom fyri!"

Tá var unga konan skjót at lofta orðum hansara. „Kann eg spyrja teg um eitt? Hvørjum takkar tú? Hvagar vendir tú tær við tínari tøkk?" Hann fekk ikki orðið upp. Hann sat bara og stardi. Men eg haldi, at hann heilt vist fekk nakað at hugsa um.

*Effie Campbell.*

# Hetta mátti eg gjalda

Vit gruna ikki hvussu nógv, ið Jesus mátti líða, fyri at keypa okkum frelsuna. Vit ána ikki, hvussu dýr hon var í veruleikanum.

Ein gomul kona plagar at lurta eftir telefonandaktini hjá Indre Mission. Ein dagin var tað ein skúlatænari, sum æt

Christen Madsen, sum helt andaktina. Hann var úr Fredericia og var so ógvuliga eyðmjúkur. Henda andaktin hevði stóra ávirkan á hesa gomlu konuna, og hon segði mær frá innihaldinum. Christen Madsen, sum var ómetaliga rørdur, meðan hann talaði, greiddi soleiðis frá:

Eg sá einaferð eina sjón. Eg sá ein naknan mann upp á langan avstand. Eg helt, at hetta mundi vera ein víkingur ella ein sinnisbrekaður maður. Spakuliga kom hann gangandi ímóti mær. Tá ið hann nærkaðist, sá eg, at hann var fullur í sárum um allan kroppin. Hendur og føtur vóru gjøgnumstungin og síða hansara við. Hann rætti hond sína út móti mær. Í fyrstani hugsaði eg, at tað var ein steinur í henni, sum hann mundi hava tikið upp á eyrvegnum. Men so sá eg, at tað var ein gimsteinur, sum glitraði og glampaði. Hesin glansurin speglaðist aftur úr eygunum á manninum. Brádliga sá eg, at navn mítt stóð skrivað á steininum: Christen Madsen.

Eg visti, at hetta var Jesus. „Hetta mátti eg gjalda fyri at bjarga tær," segði hann.

Eg legði meg á knæ at tilbiðja mín Harra og Frelsara, og síðani tann dagin havi eg fylgst við honum.

*Effie Campbell.*

# Millióningurin, sum gav

**Hin kendi amerikanski margmillióningurin Rockefeller greiðir frá, hvussu hansara yrkisleið byrjaði:**

„Ja, eg gevi tíggju prosent av tí, sum eg forvinni til Guds ríki. Eg sigi tær fegin, hvussu alt byrjaði. Tá ið eg var lítil smádrongur, mátti eg uppihalda mammu mínari. Fyrsta løn mín var hálvurannar dollari (tíggju krónur) um vikuna. Eg gav mammu pengarnar. Hon helt teir í hond síni og segði við meg, at hon hevði verið glað, um eg gav Harranum tíggjunda partin.

Tað gjørdi eg. Og síðani tann dag havi eg givið tíggjundan av hvørjum dollara, sum Gud hevur vælsignað meg við. Og eg vil so fegin fáa sagt tær hetta: Um eg ikki var byrjaður at geva Gudi tíggju prosent av inntøku míni – av tí fyrsta dollaranum, eg fekk í løn – so hevði eg heldur ikki latið tíggjundan av míni fyrstu millión. Sigið fólki, at tey mugu læra seg at vera trúgv at geva til Guds ríkis søk."

*John D. Rockefeller, senior. „Shalom".*
*Effie Campbell* umsetti.

**Tað ber til at liva uttan Jesus;** men tað ber ikki til at doyggja uttan hann.

*e.c.* ums.

# At flyta

At flyta her í tíðini kann vera bæði stríggið og strevið, men hugsa um, tá ið tíðin er av, og tú skalt flyta upp til hin stóra hvíta skaran! Har fert tú at møta einglakórinum, og tú fert at hitta hann, sum bæði verður kallaður Orðið, Jesus Kristus og Guds Lamb. Tá ert tú komin heim med alla og ert saman við tínum kæru. Haðani fer tær ongantíð at leingjast, tí har skalt tú altíð vera.

**Ert tú til reiðar at flyta?** *Effie Campbell* umsetti.

# Guds langmóð

„Vanvirðir tú ... góðsku hansara og tolmóð og langmóð?“ Róm. 2,4. Gud er ógvuliga tolin og langmóðigur; men tað er eitt mark. Onkur hevur sammett Guds langmóð við eitt elastikk. Hann toyggir og toyggir elastikkið út, tí hann vil ikki, at nakar skal glatast. Men at enda brestur elastikkið, og tá eru menniskju farin út um markið, t.d. Judas og menniskjuni á Nóa døgum. 1. Pæt. 3,20.

*e.c.* ums.

**Gud hevur ført Ísrael, sítt gamla fólk, heim,** fyri at tey skulu verða verandi í landinum og harvið boða frá, at tíðin, til Messias kemur aftur, nærkast. Hann gongur við kvikligum fetum nú.

*e.c.* ums.

**Tað er alneyðugt at hava eina visjón,** ein brennandi eldhuga, fyri Guds søk, og tað er av størsta týdningi at halda visjónini livandi.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 25. okt. | **Tekstur:** | 1. Mós. 29, 1–30; 31,2–3; 33,1–11 | **Bíbliuorð:** | 1 Mós 31,3 |
| 1. nov. | **Tekstur:** | Opb. 7,13–17; 21,1–5 | **Bíbliuorð:** | Áps. 2,21 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – controlp@controlp.fo – tel. 35 77 74